# Barnafestivalur í Grasagarði

Leygardagin skipaði Margarinfabrikkin fyri stórum barnafestivali í Grasagarði í Havn. Í góðveðrinum vóru fleiri enn 2000 fólk savnað, bæði børn og vaksin. Stóra trekkplástrið var danska barnastjørnan Mohammed, men fólk fingu eisini aðrar góðar upplivingar av pallinum, har millum annað fløguaktuella Jensina, Trøllapætur og ung frá Margarinfabrikkini framførdu.


*Segði nakar Muhammed-tekningar?*



*Kristian hittir stóru fyrimyndina Muhammed. Heima í kamarinum hevur Kristian prýtt veggin við myndum av Muhammed, so hann var glaður at hitta donsku barnastjørnuna*










*Jensina rúnarbant børnini við herligum humori og góðum tónum. Í vikuni sendir hon nýggja fløgu á gøtuna. Barnahjartafløga, eitur hon*


*Vit fara vónandi at hoyra nógv meira til 13 ára gomlu Mariu Ronnadóttir, sum ikki hevur góðu sangrøddina frá ongum. Foreldrini eru Rúna á Heygum og Ronnie Nielsen*